# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fýra menn kunnu tryggja javnstøðu á tingi

Í dag verður altjóða kvinnudagurin hátíðarhildin kring knøttin. At tað í ár eru 100 ár síðani, at stig varð tikið til at hátíðarhalda hendan dagin, fer sjálvandi at seta sín serliga dám á dagin. Hugstoytt kortini, at tað í heila tikið skal verða neyðugt at hátíðarhalda ein slíkan dag 100 ferðir, tí eyðsæð átti hesin demokratiski trupulleikin langtsíðani at verið loystu - nú vit skriva 2010.

Á tingi liggja nú fleiri uppskot um at broyta vallógina aftur soleiðis, at landið verður býtt sundur í valdømi. Hetta er fyri at tryggja, at øll øki í landinum verða umboðað á tingi, siga tey tingfólk, sum vilja hava gomlu skipanina aftur, ella eina, ið líkist henni.

Hetta er sjálvandi eitt sjónarmið við sínum demokratisku grundgevingum. Tá Edmund Joensen legði uppskotið fram um at broyta Føroyar til eitt valdømi stutt fyri síðsta løgtingsval var ein grundgevingin, at hetta fór at skapa størri javnstøðu á tingi. Hetta verður sjálvandi trupult at prógva, men vit kunnu so siga, at øll fólk í Føroyum við hesi skipan hava sama møguleika at velja ímillum øll valevnini, sum bjóða seg fram.

Eitt hugtak, sum hevur stungið seg upp í kjalarvørrinum á tosinum um at broyta valskipanina, er »økiskvotering« kontra »kynskvotering«. Tað er eitt trupult mál at skula kynskvotera eina demokratiska forsamling, sum eitt parlament er. Men tá kvinnur samanbera hetta við økiskvotering, so er grundgevingin áhugaverd: Tá til dømis ein sandingur skal veljast á ting, tí hann er sandingur. Hví skal so ein kvinna ikki veljast á ting, tí hon er ein kvinna? Hetta er ein relevantur spurningur at seta í sambandi við ta fløkjuna av uppskotum um valskipan, sum nú liggja á tingborði.

Vit hava skrivað tað fleiri ferðir fyrr á hesum teigi, at um onkur skal hava vald, so skal onkur annar missa vald. Tað er tann nakni sannleikin í einum nøtuhylki. Skulu kvinnur hava vald, so skulu menn missa vald, og tað er ein stórur trupulleiki – fyri ikki at siga, at tað er trupulleikin!

Tað ber væl til at fáa javnstøðu á tingi – tað vil siga á leið líka nógvar kvinnur sum menn – uttan at gera tað við formellum kynskvoteringum. Fýra menn kunnu gera hetta einsamallir: Um Høgni Hoydal, Kaj Leo Johannesen, Jørgen Niclasen og Jóannes Eidesgaard gera av, at í teirra flokkum vilja teir hava á leið eins nógvar kvinnur valdar, sum menn, so er trupulleikin loystur. Tað er í floksorganisatiónunum, at hetta skal skipast – og sum leiðarar í fýra av teimum størstu flokkunum, so hava teir buktina og báðar endarnar – spurningurin er so bara, um teir tora at sleppa øðrum endanum?

**Sosialurin**

## Veruleikar um flogvallarvalmøguleikar

**ZAKARIAS WANG**



Kann tað hugsast, at ikki alt er lagt á borðið viðvíkjandi tí útbygging, landsstýrið viðmælir at gera á verandi flogvøll?

Eitt hava vit í hvussu so er hoyrt lítið um, og tað er trygdargeirin.

Av tí at trygdargeirin á verandi flogvølli bert er 75 metrar hvørju megin vøllin, hava alheims loftferðslumyndugleikar (ICAO) sett avmarkingar fyri hvussu nógv kann vera í flogførunum. Hetta kann eitt nú vera tað, at flogfør, sum kunnu hava 100 ferðandi, bert sleppa at hava 85. Útreiðslurnar av at flúgva eru tær somu, men inntøkurnar eru minni, og skjótari verður at fáa hall, sum skattgjaldararnir koma at hefta fyri.

Nú hoyra vit, at trygdargeirin skal vera 150 metrar hvørju megin vøllin, og hervið slepst burtur úr hesi spennitroyggju.

Men tað passar ikki.

Trygdargeirin sunnanfyri er 150, men norðanfyri er neyðugt at flyta flestu bygningar fyri at fáa geirar so víðan. Kostnaðurin av hesum er ikki við í tí útbygging, sum er upp á tal, og tí fer ICAO framvegis at rokna við, at hesin flogvøllur hevur ein trygdargeira, sum er 75 m norðarumegin, og seta krøv um at flogførini ikki hava so nógva frakt og ferðafólk, sum tey annars kundu havt.

Ein annar spurningur er, um nakar valmøguleiki er.

Fyri nøkrum árum síðani varð eitt uppskot gjørt um ein flogvøll í Kirkjubøhaganum. Nú vit hava fingið at vita, hvat ið byggifyritøkur vilja útbyggja verandi flogvøll fyri, ber til at nýta hesar eindarprísir fyri at síggja, hvat ið tað hevði kostað at loyst úr lagdi við hesi verkætlan.

Kostnaðurin av øllum tí, sum er uttan um flogvøllin, er tann sami í báðum førum.

Men gera vit ein 1800 metra vøll í Kirkjubøhaganum, kostar hann við eindarprísunum hjá J&K Petersen 325 milliónir krónur, og tað er við 150 metra trygdargeira báðumegin, sum lata upp fyri at vit kunnu flúgva uttan darv í mjørka og náttmyrkri. Við somu eindarprísum kundu vit har gjørt ein flogvøll, sum er 2200 metrar langur, og sum kostar 430 milliónir at gera.

Veruleikin er tí tann, at tann loysn, sum nú skal setast í verk, er alt annað enn lýtaleys, og at vit kundu fingið eina haldgóða framtíðarloysn á flogvallarmálinum fyri minni enn tað kostar at gera hesa fyrilitarleysu útbygging.

## Fløkja á fiskivinnuøkinum

**BJØRN KALSØ**
løgtingsmaður



Nú lemmatrolarar eru farnir at fiska frítt á innaru leið við partroli, er áralong siðvenja við skipabólkum og grundreglu um, at veiðutrýstið ikki skal økjast, slept í føroyskari fiskivinnuumsiting. Tað sum fer fram, er ikki í tráð við lógina um vinnuligan fiskiskap og eigur at halda uppat.

Hornasteinur í fiskidagaskipanini er býtið millum skipabólkar, har skip verða flokkað eftir reiðskapi, støddog maskinorku. Tríggir bólkar eru, sum trola:

- Bólkur 1, Lemmatrolarar
- Bólkur 2, Partrolarar
- Bólkur 4T, Trolbátar

Lemmatrolarar í bólki 1 eru djúpvatnstrolarar, sum vanliga fiska upsa, kongafisk og djúpvatnsfisk á ytri leið og kunnu koma á innaru leið at royna eftir upsa við avmarkaðari hjáveiðukvotu av toski og hýsu. Lemmatrolarar eru ikki í fiskidagaskipanini og fiska tí frítt, nú teir eru farnir at partrola á innaru leið.

Partrolarar í bólki 2 fiska fyri tað mesta upsa. Teir eru í fiskidagaskipanini.

Trolbátar í bólki 4T fiska havtasku, flatfisk, umframt nakað av toski, hýsu og upsa. Trolbátar eru eins og partrolarar í fiskidagaskipanini.

**Fiskivinnuumsitingin komin í trol við aðalreglu í lógini**

Fiskivinnuumsitingin saman við landsstýrismanninum er komin til, at allir trolarar kunnu partrola, sjálvt um áralong lógartulking og siðvenja frammanundan ikki hava loyvt hesum.

Í verki merkir tað, at lemmatrolarar í bólki 1 og trolbátar í bólki 4T kunnu leggja um til upsafiskiskap á jøvnum føti við partrolararnar. Fyritreytirnar hjá partrolarum og teimum útróðrarmonnum, sum fiska upsa við snellu verða munandi skerdar, heldur óskilið fram.

Veiðutrýstið á upsa fer eftir nýggju skipanini at vaksa munandi og fer íkomna støðan samstundis at forkoma øllum tosi um burðardygga upsaveiðu.

Aðalregla í lógini um vinnuligan fiskiskap er, at veiðutrýstið á fiskasløgini tosk, hýsu og upsa ikki skal økjast. Broytta umsitingarliga siðvenjan økir veiðutrýstið á upsa og er tí ikki í tráð við lógina. Fiskivinnuumsitingin er sostatt komin í trol við aðalreglu í lógini um vinnuligan fiskiskap.

**Fløkjan má greiðast**

Fyri ikki at koma í politiskt óføri, má landsstýrismaðurin greiða íkomnu fløkjuna. Hvussu hann ger tað, stendur til hansara at koma við uppskoti um.

Ein gongd leið hevði tó verið at hildið fast við áragomla siðvenju við bólkabýti. Í samband við Skálabergmálið hevur landsstýrismaðurin víst á, at siðvenja heldur eins væl í rætti og lógartekstur.

Fleiri viðmerkingar á síðu 30–31

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.